Nr. 20 • hósdagur • 30. januar 2003 • 77. árg.

# Bilar

**Bilredaktiónin á Sosialinum var boðin við til Barcelona, tá nýggi Mazda2 alment bleiv sýndur fram fyri evropeiskum Mazda umboðum seinasta sunnudag. Í føroyska ferðalagnum vóru stjórin, Jóhannes Berg, og onnur sølufólk hjá Berg Motors**




*Sølufólk og stjóri hjá Berg Motors til hátíðarhald í Barcelona í sambandi við at Mazda2 bleiv sýndur fram. Frá vinstru: Axel Ljóheim, Karin C.Hammer, Jákup Jacobsen og Jóhannes Berg*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Til Mazda avdúking í Barcelona

MAZDA2 / BARCELONA
*Magnus Gunnarsson*

Tá nýggir bilar fyrstu ferð verða alment sýndir fram, er tað ofta við einari stórslignari framsýning og undirhaldi av ymiskum slagi. Soleiðis var eisini hesaferð. Tiltakið byrjaði í stóru ítróttarhøllini, "Palau Sant Jordi", sum var bygd til Olympisku leikirnar í 1992 í. Tá øll 1500 evropeisku og skandinavisku Mazda umboðini vóru komin uppá pláss á áskoðarapallinum í høllini, fingu luttakararnir eina høvuðtelefon í part, soleiðis at meðan evropeisku Mazda stjórarnir søgdu frá gongdini og framgondini hjá Mazda í Evropa, bleiv tað, sum sagt varð, umsett til ymisk mál. Alt sum gekk fyri seg bleiv víst á stórskíggja. Millum teir sum hildu talu, var stjórin á bilverksmiðjuni í Valencia, har sum Mazda2 verða framleiddir. Hann greiddi frá, at Mazda2 verður gjørdur á somu verksmiðju sum Ford Fiesta, Fusion og Ka. Hóast Ford eigur ein triðing í Mazda, er hetta fyrstu ferð, at ein Mazda bilur verður gjørdur í Evropa. Mazda2 verður bygdur yvir sama plattform sum Ford Fiesta. Men talan er um ein Mazda bil, við øllum tí sum teir eru kendir fyri. Mazda í Japan settu strong krøv til verksmiðjuna í Valencia. Úrslitið er, at bilarnir verða gjørdir í gjøgnumførdum kvaliteti, segði stjórin á verksmiðjuni.



*Mazda forsetin í Evropa, Stephen Odell, heilsar her uppá Jóhannes Berg, stjóra hjá Berg Motors. Føroyar hava sjálvstøðuga Mazda umboðan.*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Áhugin var stórur fyri Mazda2, ið verður gjørdur í Valencia í Spanien*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

### Føroyar sjálvstøðga umboðan

Tá bilarnir blivu avdúkaðir, og alment sýndir fram, sluppu øll Mazda umboðini til bilarnar. Teir blivu kannðir frá øllum síðum, innan og uttan. Eisini vórðu nógvar myndir tiknar. Borðreitt var eisini til øll 1500 fólkini. Føroyska ferðalagið settist við borðið, har føroyska flaggið stóð. Undir borðhaldinum var nógv undirhald, har tónleikabólkar og onnur listarfólk sýndu fram. Størsta "yvirraskilsi" hetta kvøldið var tá ein reyður Mazda RX-8 koyrdi inn á pallin. Eftir eini lítlari løtu hvarv bilurin í allari fólkamongdini, men tað lukkaðist okkum tó at fáa onkrar myndir í kassan. RX-8 er ein sportvognur við 240 hk wankelmotori. Bilurin hevur 4 hurðar og ongan stólpa millum hurðarnar, so tað er eins lætt at seta seg inn á baksetrið sum á forsetrið.

Annars var Barcelona eitt upplivilsi. Ein vakur og rúmligur býur við breiðum og beinum gøtum. Listarverkini og byggilistin hjá kenda arkitektinum og listarmanninum Antoni Gaudi (1852-1926), seta sín heilt serliga dám á býin. Høvuðsverk hansara er kirkjan "Sagrada Familia", ið hevur staðið í gerð síðan 1882.



# Mazda2 – fyrsti Mazda sum verður gjørdur í Evropa

**Fyrr vóru japansku bilarnir einans gjørdir í Japan, men soleiðis er ikki longur. Nú verða teir eisini gjørdir aðrastaðni. Nýggi Mazda2, avloysarin hjá Mazda Demio, verður gjørdur í Valencia í Spania**

MAZDA 2 / BARCELONA
*Magnus Gunnarsson*



*1500 fólk úr Evropa og Skandinavia vóru til framsýning í Barcelona seinasta sunnudag*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Mazda2 er ein heilt nýggjur bilur, sum verður gjørdur í Valencia í Spania. Bilurin verður gjørdur á somu verksmiðju sum Ford Fiesta, Fusion og Ka. Mazda2 er gjørdur í sama stýli sum Mazda6, viðvíkjandi designi og innrætting við t.d. alu-look innan. Talan er eum ein 5 persónabil við 330 litra viðførisrúmi. Viðførisrúmið er í somu stødd sum t.d. á VW Golf. Lessihæddin aftan er lág, so lætt er at leggja størri lutir inn í bilin. Um baksetrini og høgra forsetur verða løgd fram, er pláss fyri tveimum súkklum í bilinum. Innan er eisini gott pláss, og bilurin er góður at koma inn í. Nakkapúturnar aftan kunnu koyrast heilt niður, so tær ikki taka útsýnið, tá fólk sita har.



*"Yvirraskilsi" hetta kvøldið. Ein reyður Mazda RX-8 við 240 hk wankelmotori koyrdi inn á pallin. Bilurin hevur 4 hurðar men ongan mittarstólpa*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Bilurin fæst við 1,2 litur, 1,4 litur og 1,6 litur bensinmotorum og 1,4 litur commmon-rail dieselmotori. Trygdin er eins og í størri bilum við t.d. ABS bremsuskipan og DSC (Dynamic Stability Control), airbag framman, í síðunum og gardinairbag. Mazda2, ið einans verður gjørdur sum hatchback við 5 hurðum, skal kappast við bilar sum Toyota Yaris og VW Polo. Mazda koma at gera nógv við at marknaðarføra Mazda2. Bilarnir koma á marknaðin í apríl, men hjá Berg Motors rokna tey við at fáa onkran framsýningarbil til 1. mars.




*Jákup Jacobesen, sølumaður hjá Berg Motors, væntar sær nógv av Mazda2*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Kia tvífaldað søluna



Í Danmark hava Kia tvífalda søluna við 1289 bilum í 2002 samanborið við 608 í 2001. Málið varð tó ikki nátt, sigur stjórin Jens Bjerrisgaard. Teir høvdu væntað at selt 1800 bilar í 2002.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai og HM



Hyundai bilverksmiðjan í Suðurkorea hevur skrivað sáttmála við FIFA um HM fótbóltin í Týsklandi í 2006. Hyundai vóru eisini flutningssponsorar í HM í Japan og Suðurkorea.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mazda6



Síðan Mazda6 kom á marknaðin í heyst, hevur bilurin fingið ikki færri enn 23 heiðurslønir í 2002. Seinast bleiv hann kosin "Årets Familiebil" av svenska bilblaðnum "Motorføreren".

*Kelda: Motor Magasinet*